## Viðmerkingar:

## Tað er ikki Nyrup, men Løgmaður sum rennur undan givnum lyftum til Føroya fólk!

Áðrenn samráðingaruppskotið varð lagt fyri uttanlandsnevndina í Løgtinginum, segði Løgmaður alment, at onki var at óttast fyri, tí farið varð ikki niður til Danmarkar at samráðast, fyrr enn ein stórur meiriluti tók undir við samráðingaruppskotinum, og Varðaløgmaður segði seg taka undir við Løgmanni.

Viðgerðin í Løgtingsins uttanlandsnevnd broytti tó onki við undirtøkuna fyri samráðingaruppskotinum, tí andstøðan bleiv hildin uttanfyri. Um Løgmaður tá hevði staðið við sítt orð, varð samráðingaruppskotið mýkt, inntil ein stórur meiriluti tók undir við tí, áðrenn farið varð til Danmarkar at samráðast um tað.

Av tí at hesa samráðingar eru av vitalum týdningi fyri framtíðina hjá Føroya fólki, er tað átaluvert, at Løgmaður ikki torir at standa við sítt orð. Um Løgmaður er "konfliktsky" ella bara ræðist ta demokratisku prosessina er ilt at siga, men framferð Løgmans í hesum máli higartil er ikki sannførandi.

Nyrup hevur alla tíðina sagt seg vilja taka undir við tí, sum ein stórur meiriluti av Føroya fólki ynskir. Niðurstøðan er tí púra greið: Hevði Løgmaður staðið við sítt orð, høvdu vit kunna havt reellar samráðingarnar millum Føroyar og Danmark umboðandi ein breiðan politiskan meiriluta saman við einum stórum meiriluta av Føroya fólki. Skal Løgmaður varðveita sítt trúvirði, sum umboð fyri alt Føroya fólk, verður tað ikki gjørt við at trumfa eitt samráðingaruppskot ígjøgnum, sum bert fjóðri hvør føroyingur tekur undir við. Áhugavert kundi kanska verið at vita, hvat ST sigur um framferð Løgmans - nú vit kunnu ringja beinleiðis?

**Tjóðskaparromantikkur og Don Juan**

Skotski professarin, James Mitchell, greiddi í Norðurlandahúsinum frá herfyri, at royndir vísa, at tjóðskaparkenslur uttan búskaparligan fyrimun føra ikki til loysing, tí tann búskaparligi fyrimunurin vigar tyngri hjá vanliga fólkinum enn tjóðskaparkenslan. Við øðrum orðum: Mann kann gott romantisera um og forelska seg í Don Juan, men tú giftur teg ikki við honum! Lyftini frá okkara Varaløgmanni um frælsari, ríkari og liviligari Føroyar eftir eina møguliga loysing, eru í fyrstu syftu ikki ólík Don Juan lyftum, tí tey eru uttan nakað ítøkuligt prógv, sjálvt ikki eina tentativa "fullveldis fíggjarlóg", kann hann vísa á! Ein loysing her og nú, er tí eitt "prøv lykken koncept", sum spælir hasard við Føroya fólki og tess vælferð, eins og kommunistiski dreymurin í seksti árunum gjørdi tað. Ein stig fyri stig yvirtøka harafturímóti gevur bæði Føroya fólki og føroysku politikarunum tíð og møguleika fyri at meta um avleiðingarnar í praksis, so hvørt sum vit taka yvir fullu ábyrgdina av teimum respektivu økjunum. Tá verður tað hópin greiðari hjá fólki at taka støðu, tí fylgirnar — góðar ella minni góðar — merkjast á egnum kroppi, og ikki sum nú við støði í teoretiseraðum loysingar lovsongi.

Fleiri av okkara kendu búskaparfrøðingum og íslendska kanningin siga samanfallandi, at ein loysing førir við sær munandi lægri livifót í Føroyum v.m. Sjálvt stjórin á Hagstovu Føroya segði í "Dagur og Viku", at neyðugt verður við stórum sparingum um føroyingar velja fullveldið.

Meiri ítøkiligt kundi verið spurt, um føroyingar fara at góðtaka, at livifóturin lækkar við 15 — 20%, ella hvat fakfeløgini siga til tað? Facilitetir, sum vit í dag hava qua ríkisfelagsskapin , falla í stóran mun burtur við eini loysing, og harvið verða valmøguleikarnir hjá vanliga føroyinginum munandi skerdir. Okkara lítilleika gevur okkum heilt einfalt ikki fíggjarlaga førleika at bjóða vanliga føroyinginum somu vælferð uttan fyri ríkisfelagsskapin sum innanfyri.

Skulu vit trúgva oman fyri nevnda skotska professara, James Mitchell, so verður tað altso ikki tjóskaparkenslan, ið kemur at avgera hvørja leið Føroya fólk velir at ganga, men tann búskaparligi fyrimunurin, sum Føroyar hava í ríkisfelagskapinum við Danmark.

Heilsan

*Tórshavn 17/10-2000*
**Regin Eikhólm**
**Tórshavn**

## Býráðsvalið 200

Eg havi játtað at stilla upp fyri Tjóðveldisflokkin til býráðsvalið. Hvørji mál fari eg so at arbeiða fyri, um ein skuldi verðið valdur?

Nú eri eg búsitandi á Argjum, so eg fari í míni fyrstu grein at umrøða tey málsøkir, sum har eru.

**Skúlin**

Skúlin hevur nú í fleiri ár verið alt ov lítil, so hetta er eitt sjálvsagt øki at fáa loyst. Annað hvørt við einum nýggjum skúla, ella byggja upp í núverandi. Hetta hevur alstóran týdning, tá ið fólkatalið á Argjum økist í stórum.

**Barnagarðurin**

Hesin eins og skúlin hevur eisini bráskund, tí hesir stovnar hanga saman, við tað at ein kann siga, at teir ganga hond í hond. Børn fara fyrst í barnagarð síðan í skúla. Tað er eingin loysn, at fólk, sum byggja á Argjum, skulu hava børn síni gangandi á stovnum í Havn. Tað besta er, at tey eru so nær heiminum sum gjørligt.

**Ringvegurin**

Ringvegurin skal gerast skjótast til ber, t.v.s., at tá ið Marknagilsvegurin er liðugur, verður farið undir ringvegin út á Argir.

**Útstykkingar uppi á Hamrinum**

Fleiri útstykkingar skulu gerast, so at ungdómurin á Argjum og onnur við, hava ein møguleika at seta búgv. Tey, sum longu eru búsett, mugu fáa betri sømdir. Umhvørvið sær alt annað enn vakurt út, her má bøtast um.

**Bátahylurin**

Bátahylurin er heldur ikki nøkur vøkur sjón. Tann, sum gongur oman á støðna sær við tað sama, at arbeiðið ikki er meira enn hálvgjørt. Als ikki nakað prýði fyri Argjabygd. Nú Havnin verður so nógv fríðkað, eiga Argir ikki at vera nakar eftirbátur.

**Fótbóltsvøllurin**

Argir hava fingið ein góðan vøll, men karmarnir rundan um vøllin eru ikki av teim bestu. Her vantar nógv í enn. Ljósviðurskiftini eru ikki av teim bestu, eingi skýli finnast og viðurskiftini at seta bilarnar frá sær eru alt annað enn góð. Hesi viðurskifti mugu fáast í rættlag.

Her eru fleiri økir nevnd, og onnur kundu verið nevnd afturat, men nokk á hesum sinni.

Fleiri argjafólk eru uppstillað í ymiskum flokkum, og øll vilja tey arbeiða fyri betri umstøðum í bygdini, men ynskja argjafólk størri framburð, mugu tey velja okkurt av hesum valevnum.

Eitt gott boð um framburð á Argjum er eitt av valevnum Tjóðveldisfloksins.

Mín næsta valgrein fer at snúgva seg um Havnina. Hvørji málsøki eg har vil arbeiða fy ri.

**Arnbjørn Madsen,**
**valevni**
**Tjóðveldisfloksins**

## Tú eigur at vera nóg góður at bera teg sjálvan – Leivur!

**Sitandi býráð – undir tjóðveldisleiðslu – hevur megnað at fingið kommununa úr tí fíggjarliga óføri, hon kom sær út í upp gjøgnum áttatiárini**



Maðurin aftan fyri hesi megnar orð er ongin minni enn sitandi býráðsformaður í Havn Leivur Hansen og skrivar hann hetta í eini valgrein í Dimmu hósdagin 12. okt. 2000.

Við øðrum orðum má fólkaflokkurin ella undirritaði, sum hesi árini sat við leiðsluni, hava ábyrgdina av, at kommunan kom í fíggjarliga trongstøðu, meðan hann, Leivur Hansen, sum hevur sitið hesi seinastu fýra árini, eigur ábyrgdina av, at kommunan nú fíggjarliga hevur tað gott og trygt.

Vanliga blandi eg meg ikki uppí, hvussu fólk meta um áttatiárini, og um hvør átti ábyrgdina av, at soleiðis gekk. Fólk eiga sín fulla rætt til at vera óð um avleiðingarnar av hesum árum. Men tá ein persónur sum Leivur Hansen, sum hevur sitið sum býráðsformaður í fýra ár, og sum hevur eina innari vitan sum fá onnur, loyvir sær at taka soleiðis til orða, sum hann ger í hesi grein, loyvi eg mær fyri fyrstu ferð síðani eg 1. januar 1993 fór frá, at taka til penning.

Fyrst er at siga, at kommunur sum heild hava nakrar bundnar uppgávur. Kommunur eiga at loysa ávísar uppgávur fyri borgaran, s.s. bústaðir og grundstykkir, vegir, vatn, kloakkir, barnaansing, skúlar, frítíðarvirksemi, reinhald og rusk, vinnu- og havnarøkir v.m.

Beinleiðis hevur kommunan so at siga lítla og onga ávirkan á, hvussu búskapargongdin í einum samfelag fer – men skal til eina og hvørja tíð loysa tann tørv borgarin hevur í tí samtíð vit liva í.

Hetta var orsøkin fyri, at vit í áttatiárunum brúktu umleið 100 mill. til útstykkingar, 100 mill. til vegir og kloakkir, 150 mill. til vatn, 130 til brennistøð, 200 mill. til vinniøkir og havnarbyggingar, 80 mill. til skúlar, 150 mill. til barnaansing (siti beint nú og lurti eftir útvarpskjaki, har Leivur sigur, at ongantíð í søgu býráðsins eru so stór framstig hend á barnaansingarøkinum sum nú. Hetta er heldur ikki rætt – ongantíð í søgu býráðsins er so nógv hent á barnaansingarøkinum sum í tíðarskeiðnum 1985-1990).

Soleiðis kundi eg hildið fram, men gott er. Tað óhepna við øllum hesum var, at brádliga vóru tíðirnar búskaparliga broyttar soleiðis til tað vera, at íløgukarmarnir blivu alt ov stórir til tann tørv, sum borgarin í Havn tá hevði.

Ongin loyna er, at kommunan gjørdi milliarda íløgur hesi árini, og at eftir stóð ein skuld uppá umleið eina hálva milliard.

Í sama tíðarskeiði fór Tórshavnar kommuna – orsakað av búskaparkreppuni – frá eini skattainntøku uppá umleið 160 mill. í 1988 niður á 130 mill. í 1992.

At hetta mátti geva kommununi fíggjarligar trupulleikar, er kanska ikki hjá hvørjum borgara í Havn til at skilja, men ein býráðsformaður, sum hevur sitið í fýra ár, skal skilja tað.

Einfalt sagt: Tað sum VAR ringt fyri kommununa og okkum, sum tá sótu, ER heilt einfalt orsøkin fyri, at Tórshavnar kommuna og tit, sum í dag sita, hava tað gott.

Allar íløgurnar, sum gjørdar vóru tá, koma í dag væl við. Ongin teirra var ikki røtt. Tórshavnar kommuna var 1992 væl skipað, væl útbyugd og klár til at taka ímóti einum búskaparligum vøkstri, tá hann fór at koma.

Búskaparframgongd hevur verið hesi seinastu árini, og Tórshavnar kommuna er farin úr einari skattainntøku uppá 130 mill. upp í 380 mill. Hon hevur í sama tíðarskeiði – mótvegis nógvum øðrum kommunum – ikki haft fyri neyðini at gera nakrar nevniverdigar íløgur síðan 1992.

Hetta er orsøkin til, at kommunan ídag er so væl fyri, sum hon er. Lat tað vera sligið fast við tíggju tumma seymi.

Vit sum tá sótu, fingu mangan koyrilin fyri tær íløgur, vit gjørdu í Tórshavnar Havn. Eg skal ikki endurgeva nakað ella navngeva nakran í hesum sambandi. Bert siga, at tær íløgur, sum tá vóru gjørdar, ella allan heiðurin fyri, at Tórshavnar Havn nú er so væl fyri. Hon forrentar seg sjálva umframt at klára at gera nýggjar íløgur – og hon er kappingarfør at taka ímóti vøkstrinum, ið búskapargongdin krevur.

Vóru hesar íløgur ikki gjørdar, var Tórshavnar Havn – stoltleikin hjá havnarfólki – ikki til ídag. So einfalt kann tað sigast.

Lat meg so leggja aftrat, at Tórshavnar Havn hevur ongantíð í nýggjari tíð ligið havnaborgarum til byrðu. Hon hevur klára seg sjálv og afturgoldið sínar íløgur við teimum inntøkum, hon hevur fingið frá teimum, sum hava haft tænastu hennara fyri neyðini.

Arbeiðslagnum hjá Leivi og býráðnum sum heild havi eg alt gott at bera, og er orsøkin fyri hesi grein míni tí bert at veita valkjakinum nøkur fakta, sum flest allir býráðslimir og valevnir eiga at vita og hava í huga, tá valgreinar verða skrivaðar.

Áttatiárini vóru dýrur læripeningi fyri okkum øll, og tann venda búskapargongdin sær nú út til aftur at leggja trýst á býráðsvalevnini soleiðis, at lyftini, sum givin verða borgarunum, yvirhála tað, sum fór fram í áttatiárunum.

Fari at ynskja tykkum valevnum eitt gott og kveikjandi valstríð, men minna á, at vit liva enn av tí, sum fiskiskapurin gevur okkum. Við hesum veruleika í huga eiga vit at mynda framtíðina. Innan hesar karmar ber eisini væl til at virka og fáa eitt skilagott býarsamfelag.

Vinarliga,

**Poul Michelsen**
**fyrrverandi**
**býráðsformaður í Havn**

DAGFØR
TEG
HALT
SOSIALIN

Tekna teg sum haldara, so fært tú sosialin 5 ferðir um vikuna til dyrnar

Tíðindablaðið
sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið *5 ferðir um vikuna.*

Navn:
Búst.:
Postnr., bygd, býur:
Tlf.:
Undirskrift:

☐ Haldarar í Føroyum: 360,-/ársfj.
☐ Haldarar í Europa: 510,-/ársfj.
☐ 5 bløð einaferð um vikuna í Europa: 425,-/ársfj.
☐ Onnur lond: Ymiskir prísir
☐ Internet: 240,-/ársfj.

Í býin - altíð eitt stað at fara

Streymoy

Kaggin

Fríggja-og leygarkvøldið spælir
ALL THAT RAIN

FÓTBÓLTSDYSTIR
Mik. 18/10 kl. 19.00: Manchester United PSV Einhoven
Ley. 21/10 kl. 11.30: Manchester United Leeds
Ley. 21/10 kl. 19.25: Milan Juventus
Sun. 22/10 kl. 16.00: Aston Villa FC Sunderland AFC
Sun. 22/10 kl. 19.25: AC Perugia Parma AC
Mán. 23/10 kl. 17.30: FC Midtjylland FC København
Mán. 23/10 kl. 20.00: Southhampton FC Manchester City FC
Týs. 24/10 kl. 19.00: Anderlect Manchester United

5'ARI
frí.-, leyg.- og sunnukvøld frá kl. 17.00

Kaggin
www.kaggin.fo
Sosialurin - 311820

NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen

Leygarkvøldið:
• Úr Vestmanna kl. 24
• Úr Tórshavn kl. 01
• Úr Vestmanna kl. 04
• Úr Tórshavn kl. 05

(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð, tá fráboðan fyriliggur)

Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu



Tlf. 424254
Bussarnir:
Tlf. 287752 • 286254

fk Mat-seðilin

Hósdagin 19. okt.: Revelsbein
Fríggjadagin 20. okt.: Nakkakotelettir
Leygardagin 21. okt.: Lambasteik
Mánadagin 23. okt.: Kjøtfrikadellir
Týsdagin 24. okt.: Saltkjøt
Mikudagin 25. okt.: Hamburgarygg

Kostnaður 32,- kr.

***

Seinnaparts-TILBOÐ
frá kl. 14.00:
Juniorburgari 14,95
Maxiburgari *ella* Búffsandwich 19,95

Matstovan í Hoyvík

Lesið sosialin sosialin sosialin -tað loysir seg

AUTO
- Dag sum nátt -
- skjótt og gott -
Skalt tú bil hýra - so er tað 311234
AUTO
BENZIN
DIESEL
KIOSK
- ALT DØGNIÐ -
AUTO 311234

sosialurin
Altíð fyrst við
www.sosialurin.fo

Nor›oyggjar

Klaksvíkar Klubbi

Dansur verður leygarkvøldið 21. oktober
"MARTIN" vendir plátum

Klubbin hevur:
POOLBORÐ
BILLARDBORÐ
ENSKAN FÓTBÓLT Á SKY

Vilja tygum vi› í
Í b‡in - hvønn hósdag

Ynskja tygum at l‡sa í teiginum *í b‡in*, so fylli› út henda lepan og sendi› hann til **Sosialin, box 76, 110 Tórshavn** – ella fax 314720

Tekstur